Kunning um PISA-kanningina 2025

Inngangur

Fyri áttandu ferð verður PISA-kanning í Føroyum. Allir næmingar í 9. flokki luttaka í kanningini, sum verður gjørd í tíðarskeiðinum frá 3. mars til 27. apríl 2025. PISA-kanningin kannar førleikarnar í lesing, støddfrøði og náttúruvísindum, og í 2025 er denturin lagdur á náttúruvísindi. Tað merkir, at flestu uppgávurnar eru í náttúruvísindum, men næmingarnir fáa eisini uppgávur í støddfrøði og lesing. Harumframt eru í 2025 nakrar uppgávur, sum snúgva seg um forritan og telduliga hugsan.

Um PISA-kanningina

PISA er stytting av **P**rogramme for **I**nternational **S**tudent **A**ssessment. Kanningin verður gjørd triðja hvørt ár í fleiri enn 90 londum kring allan heimin. Næmingarnir, sum verða kannaðir, eru allir um 15-ára aldur og standa á gáttini til at fara víðari í útbúgvingarskipanini ella á arbeiðsmarknaðin.

Endamálið við PISA-kanningini er at kanna og samanbera fakligu førleikarnar hjá næmingunum at virka í veruliga lívinum, antin í útbúgvingarskipanini ella á arbeiðsmarknaðinum.

Føroysku PISA-úrslitini kunnu geva eina mynd av, hvussu tað stendur til við læring í eini røð av kjarnaøkjum í føroysku skúlaskipanini. PISA er harvið eitt týðandi amboð hjá fakfólkum og politikarum til at menna okkara skúlaskipan.

Fakligi parturin av PISA-kanningini tekur tveir tímar umframt ein stuttan steðg miðskeiðis í royndini. Allir næmingarnir fáa ikki somu spurningar.

Altjóða serfrøðingabólkar menna karmarnar fyri royndina, og lærugreinaserfrøðingar í einstøku londunum kunnu gera uppskot til uppgávur. Uppgávurnar verða gjølla endurskoðaðar við atliti at mentanarligum ymisleikum, og tær verða eisini royndar í undankanningum í øllum londum. Bestu uppgávurnar verða síðan brúktar í sjálvari PISA-kanningini.

Fleiri tættir verða kannaðir

Umframt sjálva PISA-kanningina svara næmingarnir eisini einum spurnablaði um millum annað treysti og sjálvsálit, sum gransking sigur er týdningarmikið fyri læring. Spurt verður m.a. um, hvussu tey fata tað at ganga í skúla, um hjálp og afturboðan frá lærarum, um óljóð og órógv í tímunum, nýtslu av kt-amboðum, kropsliga rørslu og framtíðarætlanir.

Skúlaleiðslurnar svara eisini einum spurnablaði um til dømis vav og slag av undirvísingartilfari og amboðum á skúlanum, fakligu menningina hjá lærarunum og samstarv við foreldrini.

Saman við PISA-úrslitunum geva spurnabløðini vitan um, hvat hevur týdning fyri læring.

Les meira um PISA á www.provstovan.fo

Yvirlit yvir kanningardagar:

Dagur	**Skúli**
10.03.2025	Skúlin á Fløtum
11.03.2025	Kollafjarðar skúli
11.03.2025	Skúlin við Løgmannabreyt
17.03.2025	Skúlin á Giljanesi
17.03.2025	Sørvágs skúli
18.03.2025	Runavíkar Kommunuskúli
18.03.2025	Stranda skúli
19.03.2025	Hoyvíkar skúli
19.03.2025	Sankta Frans Skúli
24.03.2025	Skúlin við Streymin
24.03.2025	Vestmanna skúli
25.03.2025	Á Skúlatrøð
26.03.2025	Eysturskúlin
27.03.2025	Fuglafjarðar skúli
28.03.2025	Sandoyar Meginskúli
31.03.2025	Tofta skúli
02.04.2025	Skúlin á Argjahamri
03.04.2025	Tvøroyrar skúli
03.04.2025	Vágs skúli
04.04.2025	Hvalbiar skúli